# Páskir

*Kjartan Stakksund*

### Tornakrýningin

Tá tóku hermenn landshøvdingans Jesus við sær inn í borgina og savnaðu alla manningina uttan um hann. Og teir lótu hann úr og hongdu eina skarlaksskikkju upp á hann; og teir flættaðu eina krúnu av tornum og settu honum á høvdið og góvuhonum ein sevlegg í høgru hondina; og teir fullu á knæ framman fyri honum og hildu hann fyriháð og søgdu: »Heilur og sælur, tú, Jøda kongur!« Og teir spýttu á hann, og tóku sevleggin og slógu hann í høvdið á honum. Og tá ið teir høvdu spottað hann, lótu teirhann úr aftur skikkjuni og lótu hann í hansara egnu klæði; og teir fóru avstað við honum at krossfesta hann. Matt. 27, 27–31.

Hetta var prísurin fyri frelsu okkara, háð, spott, tornakrýning og at enda krossfesting; ja, so nógv skuldi til fyri at syndaskuld okkara kundi verða strikað, tann syndaskuld, ið lá á mannaættini síðani syndafallið í Edens aldingarði á sinni, tá Adam og Eva fullu fyri freistingini, við tað at tey ótu av eplinum og sostatt vóru Gudi ólýðin, og hetta elvdi til at øll mannaættin kom at liggja undir deyðadómi, og tí eru glatunnar børn øll somul, eingin undantikin, tí mátti Gud rinda so nógv í loysigjaldi fyri ta falnu mannaættina, hann mátti senda sín einborna son til jarðar fyri at bjarga sínum falna skapningi aftur til Guds, soleiðis sum skrivað stendur í lítlu bíbliuni. Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív. Jóhs. 3,16.

Vit standa í botnleysari skuld, tað er einki av okkara, sum kann brúkast sum loysigjald fyri syndina, hvussu vit so bera okkum at, so koma vit ongantíð at kunna gjalda fyri syndina; tað er einans eitt offur, sum kann rinda skuldina, tað er júst tað, sum Jesus mátti ígjøgnum á Golgata krossi, øll tann líðing, hann mátti ígjøgnum áðrenn hann varð krossfestur, tað er onkur, sum hevur sagt viðvíkjandi tornakrýningini, at teir rómversku hermenninir trýstu tornakrúnuna enn fastari niður á høvdið, soleiðis at lýðingin skuldi verða enn svárari.

Tað er ikki til at skilja, at Gud skuldi hava ein slíkan kærleika til mannaættina, at hann vildi senda sonin her niður til jarðar fyri at bjarga okkum frá ævigari glatan; men so stór er Guds náði, ja, hon røkkur út um øll landamørk og um øll samkomumørk, tað er einki, sum kann forða Guds náði at náða til eitt menniskja, tí at vit eru øll elskað av Gudi, hann vil ikki at nakað menniskja skal glatast, men at øll skulu verða frelst.

### Heilagi Andin

Tá ið tað verður sagt, at Gud elskar øll menniskju, so vil tað ikki siga tað sama sum at hann er líkasælur og ber yvir við syndini; nei, hann hatar syndina, men elskar syndaran, og vil fyrigeva okkum alla syndaskuld okkara, bert vit vilja koma til hansara við allari synd okkara, biðja um fyrigeving, so vil hann fyrigeva okkum ríkiliga; ja, hjá honum er tað øðrvísi enn við okkum, vit seta ofta mørk fyri hvat vit skulu fyrigeva næsta okkara ella ikki, Gud fyrigevur okkum alt uttan nakað mark, hann fyrigevur okkum alla synd okkara, soleiðis at vit eru fullkomiliga skuldafrí.

Hvussu er við tær? Er tað soleiðis, at tú kennir teg niðurtyngdan av syndaskuld, tú sær ongan veg fram, tað er ein, sum kennir tína vónleysu støðu, hann er fúsur til at hjálpa tær burtur úr tí vónleysu støðu, tú er komin í; tað er Heilagi Andin, sum vísir tær hvørja støðu tú er komin í, tað sum tú hevur at gera er at koma til Jesus, soleiðis sum tú er, tað nyttar tær einki at tú byrjar at pynta upp á lív títt, endin verður bert tann, at tú søkkur longur niður í vónloysi. Kom tí til Jesus við allari tínari synd, og hann vil frelsa teg. Tú verður eitt nýtt menniskja, tað gamla er farið, tú fært loyvi til at byrja eitt nýtt lív saman við tínum frelsara eins og tann burturvilsti sonurin. »Ein maður átti tveir synir. Og hin yngri teirra segði við faðirin: »Faðir, gev mær tann partin av ognini, sum mær líknast«. Og hann býtti góðsið millum teirra. Og ikki mangar dagar eftir hetta savnaði hin yngri sonurin alt saman og fór burtur í eitt fjarlagið land, og har oyddi hann burtur ogn sína í einum óryggiligum levnaði. Men tá ið hann hevði forkomið øllum burtur, kom hørð hungursneyð um hetta sama land, og hann fór at líða neyð. Og hann fór til ein bónda har í landinum og helt seg aftrat honum, og hesin sendi hann út á mark sína at sita hjá svínum. Og hann vildi fegin fylla búk sín av tí dravi, sum svínini ótu; men eingin gav honum nakað. Tá gekk hann í seg sjálvan og segði: »Hvussu mangir bønarmenn hjá faðir mínum hava ikki yvirflóð av mati, men eg doyggi her í hungri! Eg vil standa upp og fara til faðirs míns og siga við hann: »Faðir, eg havi syndað ímóti himlinum og ímóti tær; ikki eri eg longur verdur at eita sonur tín; lat meg sleppa at vera sum ein av bønarmonnum tínum?«« Og hann reistist og tók at ganga til faðirs síns. Men meðan hann enn var langt burtur, sá faðir hansara hann og tókti stórliga synd í honum; og hann kom rennandi og hálsfevndi hann og kysti hann. Men sonurin segði við hann: »Faðir, eg havi syndað ímóti himlinum og ímóti tær; ikki eri eg longur verdur at eita sonur tín«. Men faðirin segði við húskallar sínar: »Farið eftir teimum bestu klæðunum og latið hann í tey, og setið ring á fingurin á honum og gevið honum skógvar upp á føturnar; og farið eftir gøðingarkálvinum og drepið hann, og latum okkum eta og vera glaðar! Tí at hesin sonur mín var deyður og er livnaður aftur, hann er farin og er fingin aftur«. Og teir tóku at halda sær á gaman. Luk. 15, 11–24.

Um hetta er støða tín, mín vinur, so veit eg at sami møguleiki er fyri teg eins og tað var fyri tann burturvilsta sonin. Hervið vil eg ynskja øllum einar



### Páskasálmur

*Lag: Bf. 227.M1 184.856. Dk.409*

*Gud havi lov, á páskamorgni reyða,*
*tá Jesus Kristus stóran sigur vann;*
*hann bjarga hevur mær frá synd og deyða,*
*eg prísa honum nú av hjarta kann.*

*Gud havi lov, at vónin mær man lýsa,*
*tá eg skal fara hesum foldum frá;*
*og andi Guds mær vegin heim skal vísa,*
*har eg mín frelsara skal altíð sjá.*

*Gud havi lov, tú vegin hevur slóðað,*
*so eg kann koma heim til tín ein dag;*
*tann tøkk er veik sum eg á fold kann bjóða,*
*tær faðir mín alt gjølla veit um tað.*

*Gud havi lov, tú frelsuvegin legði,*
*sum tú ei nakar var á hesi fold;*
*í orði tínum greitt tú mær tað segði,*
*at tú íklæddist her várt mannahold.*

*Gud havi lov, at heima eg skjótt verði,*
*skal syngja tær um ævir lov og prís;*
*tær heiður, dýrd og æru eg framberi,*
*at tú mær hevur opnað sæla Paradís.*

*Gud havi lov, í tíni náði hvíli*
*eg hvønn dag, foldarlívið vara má;*
*hjá tær og Jesus er mítt trygga skýli,*
*til eg ein dag má foldum fara frá.*

**Kjartan Stakksund**

# Ein máltíð sum á Jesu døgum

Tey, ið hava hug at eta eina máltíð sum jødarnir gera tað á páskum, fáa ein gyltan møguleika til hetta um páskirnar

PÁSKASIÐUR

*Snorri Brend*

**Viðareiði:** Tað er ikki á hvørjum degi, at ein hevur høvið at eta somu rættir sum á Jesu døgum.

Men hesin sjáldsami møguleikin er til staðar, tá Hin Føroyska Ísraelsmissiónin bjóðar til serstaka jødiska páskamáltíð á Viðareiði 2. páskadag.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Ísraelsmissiónin skipar fyri slíkum tiltaki.

Endamálið er at geva fólki eina ímynd av, hvussu lærusveinarnir høvdu tað, tá teir undan páskum ótu saman við Jesusi, stutt áðrenn hann doyði á Golgata krossi.

### Sangur og upplestur

Ísraelsmissiónin hevur so líðandi fingið tann siðin inn at bjóða fólki til eina slíka páskamáltíð.

Hesar máltíðirnar hava verið á ymsum støðum, og í ár stendur missiónshúsið á Viðareiði fyri tørni.

Undir hesi jødisku páskamáltíðini fer nógv ymiskt fram. Lisið verður upp úr Bíbliuni og sangur er eisini á skránni.

Men so hava fólk eisini møguleikan at royna nakrar av teimum rættunum, sum natúrliga hoyra við til eina slíka jødiska páskamáltíð.

Neyðugt er kortini at tekna seg áðrenn, og gerst tað hjá Johan Henriksen í Klaksvík.



*Tey eru óføra hugalig, nú tey slupp at eta eina jødiska páskamáltíð*